**Býráðsfundur mánadagin 27. januar 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 21.45**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **13/00532**<br>**2.viðgerð av eykajáttan til frítíðarheimið á Gásamýri**<br>Við 1. viðgerð, sum var á býráðsfundinum tann 16. desember 2013 bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 1.000.000,00, og at peningurin verður tikin av innistandandi.<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð | Einmælt samtykt eins og við 1.viðgerð. |
| 2. | **14/00002**<br>**Umsókn frá svimjifelagnum Reysta um stuðul**<br>Svimjifelagið hevur sent umsókn inn um stuðul. Biðið verður ikki um nakara ávís upphædd, men stuðulin sum hevur verið latin seinastu árini er 60.000,00<br><br>Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á kr. 60.000,00<br><br>Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510-20 (Stuðul til ítrótt)<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini. |
| 3. | **13/00465**<br>**Umsókn frá Losjuni Glottin um stuðul til leikin Oliver Twist**<br>Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á kr. 50.000,00<br><br>Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510-10 (Stuðul til mentan)<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini og mentanarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 27. januar 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 21.45**

**4. 14/00006**

**Keyp av matr. nr. 142 í Leirvík**

Í sambandi við at vegurin Kráarvegur skal bindast í rundkoyringina á Kráartanga skal nakað av jørð keypast. Talan er um keypa matr. nr. 142 úti í Bug í Leirvík, sum er jørð niðan frá neystunum og út móti rundkoyringini.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at jørðin,matr. nr. 142, úti í Bug verður keypt.

Fíggjarnevndin mælir frá at keypa jørðina.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Oluffa Joensen.

**Atkvøður ímóti:**
Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**5. 14/000034**

**Góðkenning av roknskapi hjá bókasavninum fyri 2014**

Grannskoðaður roknskapur fyri bókasavnið fyriliggur.

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

**6. 13/00537**

**Uppskot um at flyta umsitingina hjá Eysturkommunu í onnur hølir.**

Árni Jacobsen hevur uppskot um at flyta umsitingina úr verandi bygningi við Gøtugjógv yvir á Bátasavnið í Leirvík, til nýggja ráðhúsið verður liðugt.

Minnilutin í fíggjarnevndini Jóhan Christiansen mælir til at taka undir við uppskotinum hjá Árna Jacobsen. Meirlutin Hjalti Dalheim og Brandur Jacobsen skjóta upp at umsitingin flytir yvir í Bátasavnið. Flytingin verður framd so skjótt sum, ein meirluti í Eysturkommunu býráð hevur tikið støðu til og samtykt konkreta verkætlan at byggja nýtt býráðshús.

Fyrst bleiv atkvøtt um tilmæli hjá meirlutanum í fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Hjalti Dalheim, Hanus Jacobsen, Brandur Jacobsen, Oluffa Joensen.

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Blankt:**
Emma Rasmussen:

Sosttt er uppskoti falli.

Síðani bleiv atkvøtt um uppskoti hjá Árna Jacobsen.

**Býráðsfundur mánadagin 27. januar 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 21.45**

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Emma Rasmussen.

**Atkvøður ímóti:**
Hjalti Dalheim, Hanus Jacobsen, Brandur Jacobsen, Oluffa Joensen.

Sostatt er uppskoti samtykt.

**7. 13/00476**
**Keyp av lendi niðanfyri FMP**
P/F H. Konoy hevur biðið um viðmæli frá kommununi í samband við ætlanir um at keypa lendi við verandi bygning hjá FMP.

Tilmæli frá vinnunevndini og fíggjarnevndini fyriliggja

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum*

Samtykt at Eysturkommuna viðmælir at P/F H. Konoy keypir jørðina sambært fyriliggjandi yvirliti.

**Atkvøður fyri:**
Árni Jacobsen, Ólavur Olsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Hanus Jacobsen, Brandur Jacobsen, Oluffa Joensen.

**Atkvøddi blankt:**
Hanna Jensen

*Jóhan Christiansen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**8. 13/00547**
**Frítíðarheimið á Gásamýru – millumbygningur og gamla kommunuskrivstovan**

Støðutakan til innkomin tilboð.

Tilmæli frá byggi- og býarskipanarnevndini og figgjarnevndini fyriliggja.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum*

Einmælt samtykt at taka av lægsta á kr. 1.498.905,00 kr. umframt mvg, sum er frá Sp/f MTM bygging.

**9. 11/00072**
**Jarðarkeyp til útstykking í Syðrugøtu**

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum*

Einmælt samtykt at borgarstjórin fær heimild at samráðast um eina avtalu um keyp av lendi.

**Býráðsfundur mánadagin 27. januar 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 21.45**

Endaliga avtalan skal góðkennast av býráðnum.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ____________________

Hanna Jensen ____________________

Hanus Jacobsen ____________________

Hjalti Dalheim ____________________

Ólavur Olsen ____________________

Árni Jacobsen ____________________

Oluffa Joensen ____________________

Brandur Jacobsen ____________________

Emma Rasmussen ____________________